


FÓLKATINGSVALIÐ 13. NOVEMBER 2007 LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008




# Vit vilja verja tey veruligu virðini!



JÓGVAN Á LAKJUNI
landsstýrismaður og valevni Fólkafloksins

Tað hevur ligið í føroyinginum og í okkara mentan – hóast vit ikki hava verið samd um alt – at hava virðing fyri skaparanum og hansara orði. Tí er tað so hugstoytt í dag at hoyra røddir, sum seta spurnartekin við henda mentanararv okkara!

Sum landsstýrismaður í mentamálum havi eg m.a. verið við til at hátíðarhildið 100 ára dagin hjá Heimamissiónini norðuri í Nesvík, 80 ára dagin hjá Frelsunnarherinum í Havn og nú 40 ára dagin hjá Zarepta vesturi í Vatnsoyrum, umframt at verið við til vígsluna av Oasuni í Hoyvík, Kelduni í Skálafirði og nú seinast tí nýggju kirkjuni í Hoyvík.

Vit eiga at seta ómetaliga stóran prís upp á alt hetta kristiliga virksemi, tí eingin av okkum veit og dugir at ímynda sær, hvussu stóran týdning tað hevur fyri okkara samfelag og fyri Føroyar sum tjóð. Eg hugsi ikki minst um sunnudagsskúlaarbeiðið kring landið og barna- og ungdómslegurnar bæði í Nesvík og Zarepta!

Góð, kristin uppaling hevur bara varðveitandi og uppbyggjandi ávirkan á samfelagið og er eitt gott mótspæl til so nógv negativt, sum floymir inn yvir okkum! Tí hava vit jú eisini í fólkaskúlalógini ásett, at skúlin í sátt og samvinnu við foreldrini skal hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling.

Fólkaflokkurin er ein borgarligur, konservativur flokkur, og tað liggur í okkara hugsjónum at verja hesi virðini – tað fara vit at gera, bæði á løgtingi og á fólkatingi!

# Rúm fyri okkum øllum



KIRSTIN STRØM BECH
Javnaðarflokkurin

Sum valevni fyri Javnaðarflokkin vil eg vísa á, at fyri at fáa besta dialog, virkisføri og ikki minst avrik í ríkisfelagsskapin, so er neyðugt at velja Javnaðarflokkin á fólkating.

Javnaðarflokkurin vil, heldur enn at dyrka ósemjur, nýta ríkisfelagsskapin til at fáa ítøkilig úrslit.

Flokkurin, sum ikki er bangin fyri at ganga nýggjar leiðir og sum vil nýta ríkisfelagsskapin til at fáa ávirkan og avgerðarrætt í viðurskiftum, sum hava við Føroyar at gera, harafturat byggja brýr út í heim, skapa sambond og limaskapir, ið eru til gagns fyri Føroya fólk.

Í øllum kjaki og orðadrátti um ríkisfelagsskap, altjóðaagerð, veðurlagsbroytingum o.s.fr. er alneyðugt ikki at missa uppruna aðalmál floksins úr eygsjón, at halda fast við grundsjónarmið floksins, sum er at arbeiða fyri vælferð og trivnaði hjá fólkinum.

Javnaðarpolitikkur er eyðkendur við, at breiðastu og sterkastu herðarnar bera tyngstu byrarnar. Eitt samhaldsfesti, sum eisini røkkur út um landoddarnar.

Javnaðarflokkurin vil eisini taka ábyrgd í altjóða høpi.Tað er eisini okkara ábyrgd at bøta um ávirkanina av dálkingini, at vit eisini gera okkara part av neyðugu broytingunum. At stinga høvdið í sandin – eins og strussurin, og halda at hetta ikki ávirkar okkum her úti í Atlantshavinum, er ábyrgdarleysur politikkur.

Vilt tú eitt samhaldsfast samfelag, har rúm er fyri okkum øllum, har trivnaður skal vera fyri øll, og har ábyrgd verður tikin av umhvørvinum, so er Javnaðarflokkurin besta trygd fyri hesum.Vel tí Javnaðarflokkin á fólkating.

# Vit kvinnur !



NITA NÆS
Javnaðarflokkurin

Eg játtaði at stilla upp til fólkatingsvalið, tí eg haldi, at vit sum samfelga hava brúk fyri einum javnaðaraumboði á fólkatingi. Somuleiðis játti eg at stilla upp til hetta valið,tí eg haldi, at tað hevur týdning, at eins nógvar kvinnur og menn eru at hoyra og síggja, tá tað snýr seg um at velja eitt umboð, ið skal kjakast og arbeiða fyri framhaldandi menning av samfelagsligu viðurskiftum okkara.

Eitt samfelag verður eftir mínum tykki best umsitið, har eins nógvir menn og kvinnur eru við til at taka avgerðir. Vit vita, at har sum bæði kvinnur og menn í felag eru við til at skapa karmar um samfelag okkara, har koma øll tey góðu menniskjaligu virðini til sín rætt.

Á henda hátt hava vit gjøgnum øldir útviklað okkum. Tað tykist tí skeivt og ónatúrligt, at tað næstan bara er tað eina kynið, ið myndar politiska pall okkara.

Okkara flokkur hevur havt einasta kvinnuliga løgmannin í Føroyum.Tað eri eg stólt av, og júst í hesum døgum er komin ein sera áhugaverd bók út um javnaðarkvinnubrotið Maritu Petersen, sálu.

Henda bókin kann geva okkum øllum, serliga okkum kvinnum, íblástur og dirvi til at røkka heilt til politisku hæddirnar, har politikur verður okkara dagliga arbeiði.

Eg fari tí at heita á allar kvinnur í landinum! Hugsið tykkum væl um, áðrenn X verður sett.

Gott javnaðarval øll somul.

# Bill Clinton á føroyavitjan síni segði!



EDMUND JOENSEN
Sambandsflokkurin

“Onki land kann standa einsamalt”, hesi vóru orðini hjá fyrrverandi forseta sambandsríkjana. So satt, so satt! Sagt av manni við altjóða royndum, sum ikki er bangin fyri at siga frá sannroyndum sínum.

Tí eru bert tveir møguleikar á valinum til fólkatingið: Sambandsflokkurin ella ein av hinum 5 flokkunum. Vit í Sambandsflokkinum síggja stórar og víðskygdar møguleikar í samstarvinum. Teir 5, sum vilja loysa, eru ójavnir á máli á hvønn hátt - summir fyrr og summir seinni.

Tað sigur seg tí sjálvt at Sambandsflokkurin er einasta rætta umboðið. Flokkurin gongur inn fyri skipanini og vil brúka og menna hana alsamt til Føroya fólks besta á øllum økjum.

Eitt er givið: Saman standa vit sterkari! Møguleikarnir fyri menning gerast størri og vælferðin gerst størri. Somuleiðis gerst frælsið hjá okkum øllum størri, tí sum tikið verður til, onki frælsi uttan fíggjarligt frælsi.

Sambandsflokkurin er álítandi og fer av øllum alvi at umboða føroyska fólki á ein virðiligan og mennandi hátt. Endamáli er at arbeiða fyri Føroya sak í øllum málum, bæði fyri føroyingum í Føroyum og teimum sum av ymsum áðum eru støðd í Danmark.

Ríkisfelagsskapurin skal, sum alt annað, røkjast við skili og umsorgan. Tá gerast umstøðurnar hjá Føroya fólki so góðar sum gjørligt á øllum økjum.

Minnist tí til, at á valdegnum eru bert tveir møguleikar - Sambandsflokkurin ella ein av teimum 5 loysingarflokkunum.

# Góðu føroyingar



HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Í morgin verður fólkatingsvalið

Seinast vit heittu á tykkum at fara á fólkatingval, gjørdist javnaðarflokkurin ov stuttur.

Okkum vantaðu bert nakrar fáar hundrað atkvøður, so var ein føroysk javanaðarrødd at hoyra á fólkatingi. Ein rødd, sum kundi gjørt vart við seg, tá ið Danmark dróg Føroyar við sær í kríggj í Irak, ein rødd, sum kundi arbeitt saman við landsstýrinum og rokkið uppaftur longri á leið í spurningum um størri heimildir á sjálvstýrissleið, ein rødd, sum eisini kundi gjørt vart við seg í Føroyum í t.d. Koyto, málinum og útlendingamálinum. Ein samhandsføst rødd og eitt fólk, ið vil lurta eftir okkara landsmonnum og kvinnum bæði í Føroyum og í Danmark.

Eg fari við hesum at takka tykkum mongu, sum atkvøddu fyri Javnaðarflokkinum til seinasta fólkatingsval og øllum teimum mongu, sum stuðlaðu mær persónliga. Eg vóni, at tað hesuferð fer at eydnast Javnaðarflokkinum at fáa umboð á Fólkating. Tað kann hava avgerðandi týdning fyri framtíðina bæði í Føroyum og í Danmark.

Minnist til, tað gevur onga meining at velja ein flokk í Fólkatingið ella eitt fólk, sum ikki ætlar at brúka alla sína tíð at tæna Føroya fólki í júst hesum sessi.

Sama hvussu leikur fer – so fari eg at ynskja øllum føroyingum eitt gott fólkatingsval.

# Altjóða ábyrgd – altjóða samhaldsfesti



EYÐGUNN SAMUELSEN
valevni hjá Javnaðarflokkinum

Ein tann fremsta avbjóðingin ið vit standa yvirfyri í dag, er steðga veðurlagsbroytingunum. Hetta er ein uppgáva, ið bert kann loysast um vit taka ábyrgd, bæði her heima og á altjóða stigi. Javnaðarflokkurin vil taka hesa ábyrgd. Vit halda fast við, at Føroyar skal halda ásetingarnar í Kyoto avtaluni um at minka útláti við 8 prosentum.

Vit vilja føra ein virknan umhvørvispolitik og taka ábyrgd saman við heimssamfelagnum. Vit vilja taka ábyrgd fyri at lata okkara eftirkomarar arva ein heim, har tað ber til at liva, uttan stórar og álvarsamar umhvørvishóttanir. Hetta vilja vit virka fyri eisini á Fólkatingi.

**Vit skapa úrslit – set tín kross við Lista C**